# Hugsanarfrælsið á glíðibreyt



BJARNI A. BJARNASON
Borgari í Føroyum

Hendir hetta veruliga í Føroyum?

Tað spyrji eg meg sjálvan, nú valfeløg í Norðuroyggjum hava tikið seg saman og í felag sent út eitt mótmælisskriv – ímóti mær.

Í stuttum snýr mótmælið seg um, at eg – í mínum mest náttúrliga og grundleggjandi eginleika sum privatpersónur og skattaborgari í Føroyum – havi brúkt mín grundlógartryggjaða rætt til at hava eina hugsan um nøkur týðandi samfelagsviðurskifti.

Hvat er tað so, eg havi loyvt mær at hugsa?

Eg havi sett mína undirskrift undir, at eg eri ímóti, at "alt ríkidømi (les fíggjarlóg) verður brúkt upp á at bora hol". Eg eri pápi at tveimum deiligum dreingjum, og eg ynski, at teir skulu fáa bestu útbúgvingina, sum til ber. Tað sama munnu øll onnur foreldur í Føroyum ynskja. Seinasta PISA-úrslitið gjørdi meg sera vónbrotnan, og eg haldi, sum borgari, at politikararnir raðfesta ikki útbúgving líka høgt sum samferðslukervið.

Sjálvandi skal samferðslukervið mennast, tí annars høvdu Føroyar ikki havt ta menning, tær hava havt. Men vit mugu prioritera útbúgving og heilsu. Annars støðast fólk ikki í Føroyum, og fólkatalið økist ikki, sum er okkara mál. Hetta rokni eg við, at vit øll kunnu vera samd um.

Sum privatpersónur, hvørki mótarbeiði ella eri eg ímóti, at ein Sandoyartunnil verður bygdur. At yvirskriftin á Portalinum sigur øðrvísi, má standa fyri teirra rokning (fjølmiðlamanipulatión). Mótmælisskrivið, sum eg lesi tað, nevnir onki um nakran Sandoyartunnil.

Mín hugsan sum privatpersónur, pápi og skattaborgari hevur onki at gera við mítt starv sum nevndarlimur í Norðoyatunlinum.

Tit, sum gjøgnum politisku flokkarnar eru partur av demokratisku skipanini, eiga at virða, at allir borgarar í hesum landi eru fevndir av grein 77 í Grundlógini. Henda grein tryggjar okkum øllum tali-, skrivi- og hugsanarfrælsi, og hon er høvuðsgrundarlagið undir demokratisku skipanini.

**Viðmerking**

Tá Bjarni Askham Bjarnason kallar tað fjølmiðlamanipulatión, at vit á Portalinum skrivaðu: "Tunnilsformaður fyrstur at mótmæla Sandoyartunli", so er tað ikki rætt. Bjarni Askham Bjarnason kann væl hava skrivað undir, tí hann er ímóti raðfestingunum hjá Løgtinginum, og tað hevur hann sjálvandi fullan rætt til. Men tað skert ikki burt, at mótmælisskrivið, nevnt "Ørvitistunlar" við tilvísing til lógaruppskotið um Sandoyartunnilin, er eitt mótmæli móti Sandoyartunlinum. Til ber at lesa mótmælið og undirskrivtirnar á www.gopetition.com/online/15622.html
**Eirikur Lindenskov, blaðstjóri**

# Ríkissjúkrahúsið er og verður álitið, har vit sjálvi ikki røkka

Val



HANS PAULI STRØM
landsstýrismaður

Ongin ivi skal vera um, at føroyingar skulu fáa alla ta neyðugu og ta bestu viðgerðina, tá vit gerast álvarsliga sjúk. Hóast vit ikki megna alt sjálvi, so skal ongin skal koma illa fyri, tí at okkara smáu sjúkrahús ikki klára allar truplar sjúkraviðgerðir. Tí eru vit glað fyri og trygg við, at tá kann Ríkissjúkrahúsið í Keypmannahavn vera álitið.

Serliga snýr hetta seg um serviðgerðir innan krabbamein, æðra-, hjarta- og lungnaøkið, neurologiska økið, serøki innan ortopedi, truplulleikar í smb.v. ov tíðliga fødd børn, cystisk fibrosa o. m. a.

Til hetta endamálið hava vit eina serliga játtan á fíggjarlógini, sum svarar til umleið 20% ella fimtingin av øllum okkara sjúkrahúsútreiðslum. Og henda játtanin er vaksin nógv seinastu árini, sum talvan vísir (2007 eru mett tøl): *Sí talvu*

Nógv tann størsti parturin – eini 85% - av sjúkraviðgerðini uttanlands fer fram á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn. Restin fer fram á øðrum sjúkrahúsum í Danmark – minni enn 1% fer fram á sjúkrahúsum uttan fyri Danmark. Tí má sigast at vælvirkandi atgongd okkara til Ríkissjúkrahúsið er ein lívsæðr fyri okkara sjúkrahúsverk. Og soleiðis fer eisini at vera frameftir – av nógvum góðum grundum.

**Nýtt sjúklingahotell í Keypmannahavn**

Tí verður eisini arbeitt við at útvega okkum nýtt sjúklingahotell í Keypmannahavn, at avloysa Hotel Tórshavn, sum ikki longur er tíðarhóskandi á nakran hátt. Í summar setti eg ein arbeiðsbólk at fyrireika hetta arbeiðið. Seinni í hesum hesum mánaði koma tey við sínum tilmæli til landsstýrismannin, um hvat gerast skal. Tað verður so komandi landsstýrismaður saman við komandi samgongu, sum fer at gera av, hvussu ætlanin skal fremjast. At tað verður kostnaðarmikið er ongin ivi um. Men tað er ein kostnaður vit sjálvsagt mugu raðfesta.

**Heilsusamstarv við Ísland og Skotland**

Hóast Ríkissjúkrahúsið eisini í komandi árum fer at vera høvuðsálitið fyri at fáa neyðugu atgongdina til serviðgerðir uttanlands, so er av stórum týdningi at vit eisini knýta samband við onnur sjúkrahús í okkara nærmastu grannalondum. Her verður serliga hugsað um Ísland og Skotland. Tað kann verða gagnligt at hava atgongd til hesar møguleikar aftrat Ríkissjúkrahúsinum, m.a. fyri at stytta um bíðitíðir, og fyri at økja um møguleikarnar fyri strategiskum samstarvi um menning av heilsustarvsfólkum. Hetta er eitt øki har vit onnur noyðast at gera ein serstakan stóran innsats fyri at menna og rekruttera tey heilsustarvsfólk, sum vit hava so stórliga brúk fyri.

| Serviðgerð uttanlands | 2003 | 2007 | %-broyting |
|---|---|---|---|
| Sjúklingar | 1499 | 2280 | 52% |
| Fylgjarar, avvarandi | 1080 | 1680 | 56% |
| Útreiðslur, í mió. kr. | 91 | 115 | 26% |

Hesin vøkstur í útreiðslunum til serviðgerð uttanlands er eitt vet størri enn vøksturin í sama tíðarskeiðið til tey 3 føroysku sjúkrahúsini (2007 eru mett tøl):

| Tey 3 sjúkrahúsini í Fø. | 2003 | 2007 | %-broyting |
|---|---|---|---|
| Útreiðslur, í mió. kr. | 346 | 424 | 23% |

# 27 km suðuryvir



HENRIK OLD

Tá Sandoyartunnilin varð samtyktur, var øllum framburðssinnaðum greitt, at steðgast kundi ikki á hálvari leið.

Tí var Sandoyartunnilin roknaður sum byggistig I av eini suðurleið, sum sjálvandi knýtir, so at siga, alt landið saman.

Tað kemur ikki fram í kjakinum, at við at gera henda tunnil til Sandoynna uppá 10 km, so kann koyrast 27 kilometrar suðuryvir.

Tá Sandoyartunnilin kemur út oman fyri Skopun, so kann haldast fram at koyra 9 km suðuryvir til Sands – ikki nokk við tí. Av Sandi kann haldast fram suðuryvir 8 km (bygdavegur) til Skarvanes og enntá longur suðuryvir, alt eftir hvar man velur at fara niður aftur við byggistigi II við tunnli til Suðuroynna.

So við einum tunli upp á 10 km til Sandoynna skulu leggjast 17 km aftrat við koyring suðuryvir eftir Sandoynni. Samanlagt 27 km.

Við øðrum orðum er man komin hálva leið koyrandi á veg at binda alt útflutnings framleiðandi suðurøki saman, so koyrandi verður úr Sumba til Viðareiðis.

Tross alt ikki so galið allíkavæl.

# Samtak dugur ikki at skilja millum inngjøld og útgjøld



ÓLI JACOBSEN

Eg vil ikki á nakran hátt leggja meg út í viðurskiftini hjá fiskimannafelagnum. Eg vil tó loyva mær at rætta villleiðandi tíðindini, sum koma fram um virksemið hjá felagnum, sum tað hevur verið.

Á heimasíðuni Samtak stóð at lesa mánadagin: "Fiskimannafelagið er eitt av fáu fakfeløgunum í Føroyum, sum onga veruliga eftirlønarskipan hava. Sum er fáa fiskimenn 52 kr í eftirløn fyri hvønn mynstraðan dag, herav rinda fiskimenn 22 kr, meðan reiðarin rindar 30 kr. Tískil er eftirlønin hjá einum meðal fiskimanni uml. 10.000 kr um árið, um roknað verður við at viðkomandi er úti 200 dagar um árið."

Her verður blandað inngjøld og útgjøld, og tí er hesin stubbin meiningsleysur. Hetta prógvar, at upprunin til hansara ikki veit, hvat málið snýr seg um.

Tað er inngjaldið til eftirløn hjá hvørjum einstøkum, sum er kr. 52 um dagin, meðan tað í hesum stubba verður sagt at vera útgjaldið. Inntil næstseinastu sáttmálasamráðingar hjá arbeiðarafeløgunum svaraði hetta nøkurlunda til inngjaldið fyri átta tímars dag hjá arbeiðara.

Útgjaldið valdast sum kunnugt, hvussu leingi tað verður goldið inn, rentustøði v. m.

Skipanin hjá FF hevur í hvussu er ein eginleika, sum er øðrvísi enn hjá tímaløntum. Tey viðurkenna jú, at løntakarin í verunleikanum rindar alla sína eftirløn sjálvur, tí hann fær tað minni í løn, sum hann fær í eftirløn.

Tað eydnaðist FF í 2002 at fáa reiðararar sjálvar at rinda part av eftirlønargjaldinum. Hetta var ikki smávegis avrik.

Hetta er uttan iva ikki nóg mikið. Men tá er neyvan nakar trupulleiki at gjalda meira enn eftir sama leisti sum hjá arbeiðarafeløgunum. Her er grundarlagið lagt í verandi sáttmála.

Lesið Sosialin -so eru tit við!